


www.oljan.fo

**Jan Müller** 21 - 11 - 2011

# Valiant nýtt oljufelag í Føroyum

Bretska oljufelagið Valiant Petroleum er nú partur av oljuleitingini við Føroyar. Hetta hendir eftir, at felagið hevur keypt upp norska oljufelagið Sagex. Uppkeyp Tað er ikki óvanligt í altjóða oljuverðini, at oljufeløg verða uppkeypt av øðrum ella leggja saman og harvið broyta navn. Mong eru dømini um hetta og eru fleiri av oljufeløgunum, sum frá fyrstan tíð sóu Føroyar sum eitt avbjóðandi leitiøki, løgd saman við onnur oljufeløg ella uppkeypt av øðrum størri feløgum. Dømi um hetta er Arco, sum BP keypti, Norsk Hydro, sum Statoil keypti, Texaco, sum Chevron keypti og ELF og Fina, sum Total keypti. Exxon og Mobil blivu løgd saman til ExxonMobil, Conoco og Phillips blivu til ConocoPhillips og soleiðis kundi verið hildið fram. Ein kann siga, at hetta hevur eisini havt ávirkan á oljutilgongdina í Føroyum. Nú er so enn eitt av oljufeløgunum, sum hevur verið virkið á føroyska landgrunninum í mong ár, Sagex/Geysir Petroleum vorðið uppkeypt av bretska oljufelagnum Valiant Petroleum, sum er eitt væl størri felag. Skráseting Føroyar upplýsir í lýsing í Dimmalætting leygardagin, at Fil Sagex Petroleum, filialur av Geysir í Íslandi hevur skift navn til Valiant Petroleum. Oljan.fo skilur, at Valiant Petroleum fer at halda fram við sínum virksemi í Føroyum, sum einki var hent. Felagið er við í trimum leitiloyvum. Tað er fyristøðufelag í øllum loyvunum og í einum av loyvunum er Atlantic Petroleum partnari. Felagið hevur eisini nógv loyvi hinumegin markið, vestan fyri Hetland. Eitt av kendu andlitunum í Sagex, ikki minst í Føroyum, Terje Hagevang heldur fram í Valiant eftir uppkeypið. Hann fer at standa á odda fyri leitivirkseminum hjá felagnum.